# Lívgandi listarløta í Lorvík



*Savnsmynd*

Seinasta týskvøld var kamarkonsert í Lorvík. Tað vóru tær báðar Monika Stauss Joensen og landi hennara úr Sveits Helene Ringgenberg, sum høvdu boðið til hesa konsert í Listaskálanum í Lorvík, sum tað varð lýst.

Legði tí leiðina norður í góðari tíð bæði til tess at nýta hetta høvið til eisini at støkka inn á gólvið hjá góðum kenningum og at kunna meg um, hvar hesin listaskáli var. Jú, hann var niðri í Turkihúsinum, varð sagt og vit fylgdust síðan oman.

Hugaligt var tað at ganga upp nossligu trappurnar og at sessast í avlongum rúmi, har veggirnir so at siga vóru klæddir við málningum. »Jú, sjálvandi« hugsaði eg við mær, »hetta man vera bygdasavn við málningum hjá kenda lorvíkinginum Jóannesi Kristiansen«. Men sum tú situr og skimast um teg, gerst tú greiður yvir, at eisini onnur listafólk eru umboðað í hesum savni. Ein teirra, sum eg festi meg við, var Sámal Toftenæs – maður, sum í búnum aldri er farin undir hetta listarliga ítriv. Árinið frá gitna bygdamanninum Jóannesi kemur til sjóndar, men samstundis frøist tú yvir sjálvstøðuga fjølbroytnið í myndum av náttúruumhvørvi, bygdarlívi og havnarlag.

Bygdasavn, segði eg. Nei, hetta er onki alment savn, heldur er tað reiðarin og vinnulívsmaðurin Osmundur Justinussen, sum við hesum tiltaki, har hann sjálvur veitir bæði høli og privat málningasavn, fyrimyndarliga fjálgar eisini um mentanarlívið á staðnum.

Men tað var konsert, vit vóru komin til. Skráin var fjølbroytt og væl sett saman. Hóskandi í hesum Bachári løgdu tær báðar Monika og Helene fyri við sonatu fyri violin og cembalo eftir J. S. Bach. Krevjandi tónleikur hjá fólki, sum ikki eru von við klassiskan tónleik; men mergjað og væl varð spælt, og hesi bæði ljóðføri, sum ikki eru millum teirra, ið gera mest burtur úr sær, fingu dygga ljóðliga undirtøku frá hølinum. Helene Ringenberg er serkøn í tónleiki frá eldri tíð, og ein fragd var tað at hoyra hana framføra suitu, røð av stiliseraðum tátíðar dansum, fyri cembalo-solo eftir G. Fr. Händel.

Kanska var næsta stykkið fyri okkum tað forvitnisligasta, við tað at talan er um solopartitu skrivað til og ognað Moniku. Hendan partita gevur bæði ljóðførinum og tí spælandi høvi til at fremja sín fulla førleika bæði tekniskt og dynamiskt. Tónasmiðurin Frederic Balazs, nú farin um tey áttati, er føddur ungverji, men hevur í hálvthundrað ár búð í USA. Henda veruleika helt eg meg hóma í seinna partinum við bæði eystureuropeiskum fólkatónleikadámi og jazz-rytmum handan hav.

Tónleikur kann í sjálvum sær onga søgu siga; men hevur komponisturin lagt heiti við, kanst tú ímynda tær umstøður og hendingar, sum sipað verður til. Soleiðis her í fyrra parti hendingin við eiturkoppi, sum stillisliga kemur niður undan lofti, og skrúgonga og gøtuveitslurómur í tí seinna.

Tónamálandi var eisini Suite de chasons populaires eftir nútíðartónaskaldið Pierra-André Bovey, har tær báðar Monika og Helene rættiliga fingu roynt seg í skiftandi leiki. Jú, hetta var tónleikaupplivíng, sum øll kundu vera saman um, og tá ið sponsku rytmurnar hjá Pablo de Sarasate at enda tóku seg upp í hansara »Malaguena«, var rættiligt ovfarakæti í lítla tónleikasalinum millum málningar í gamla turkihúsinum í Lorvík.

**Ólavur Hátún**

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

ÚTBERARAR
í Vági



Søkt ver›ur
eftir fólki
at bera
blø› út í Vági

Áhuga› ringi›
tlf. 211201
millum kl. 9 og 17
ella sendi›
fax til 341201

Prentmi st¿ in
Smyrilsvegur 13 - Postboks 3019, 110 Tórshavn

– Dimmalætting tlf. 341200 –

## Viðmerking

# Málið er ein góður býur

*har vinnulívið hevur góðar karmar at virka undir og menniskjuni innan bøgarðarnar hava góð kor og eitt sosialt medvit, ið ongan setir uttanfyri*

Tá núverandi býarstýri tók við, vóru vit á veg úr einum djúpum aldudali, har vit høvdu nýtt allar kreftir okkara til at temja teir brotasjógvar, sum land og býur sigldu í. Við miklum mátti, samanhaldi og nakað av hepni eydnaðist okkum at koma úr kreppuni. Hesi seinastu árini hava verið merkt av framgongd og viðgongd, sum sjáldan áður. Við góðum byrði og fullum seglum ræður tí um at halda kós og sigla við skili, so at vit ikki sigla okkum í óføri enn einaferð.

**Skuldin minkar í stórum**

Skuldarbindingin hjá føroysku kommununum hevur ført okkum í eina spennitroyggju, sum ring er at sleppa úr. Har finst eingin léttur vegur, einans hin vælkendi at gjalda hitt fasta gjaldið aftur og aftur, tí skuldin er burtur. Hetta býráðið hevur ført tann skilagóða politikk at gjalda meira enn ásett í gjaldsskipan okkara. Hetta hevur minkað skuldina í stórum lopum, so at tølini við ársskiftið samanborið við 1993 kunnu koma at síggja soleiðis út:

| | 1993 | 2000 |
|---|---|---|
| bruttoskuld | 223 mió. | 116 mió |
| rentur | 33 mió | 9 mió |
| álíkningar | 4,1 | 1,4 |

**Ábøturnar verða gjørdar miðvíst og eftir fíggjarorku**

Sjálvandi gongur ikki líka skjótt við íløgum og viðlíkahaldi, tá ein eisini skal gjalda niður skuld, men vit kunnu fegnast um, at fyri hvørjar tíggju mió. vit gjalda skuldina niður, minkar rentubyrðan við einum 0,7 mió. Sostatt verða vit betur fyri at gera ábøtur á bý okkara, fyri hvørt ár sum gongur. Mál okkara er at skipa íløgur og ábøtur soleiðis, at vit fleiri ár fram í tíðina vita, hvørji øki skulu gerast, og síðani at gera arbeiðið liðugt, áðrenn farið verður til næsta arbeiðið. Á henda hátt gerst gleðin yvir gjørda arbeiðið størri, og léttari er at bíða, tá ein veit, nær og hvar næsta arbeiðið byrjar.

**Skatturin má lækka, men nær?**

Tað hevur ofta verið sagt, at trivnaðurin minkar, tá skatturin fer upp um eitt ávíst mark. Føroyingar hava ein sera høgan skatt, og tað er eingin uggi, at danir hava skattin hægri, tí arbeiðsgleðin veksur ikki av, at onnur hava tað verri. Vit mugu stremba ímóti lægri skatti, men samstundis síggja í eyguni, at so leingi vit hava skuld at dragast við og hava nógvar íløgur at gera bæði innan veganetið, vatnið, tað sosiala og mentanarliga økið, verður trupult at seta skattin nakað munandi niður.

**Barnafrádrátturin hækkar**

Eitt kann eg tó fegnast um hesum viðvíkjandi og tað er, at tað loksins eydnaðist at fáa barnafrádráttin hækkaðan upp í 3000 kr. í 2001, og eri eg sera takksamur mótvegis hinum býráðslimunum fyri stuðulin til barnafamiljurnar.

**Hilmar Danielsen,**
**býráðslimur í Klaksvík**



**LOTTO**

**Vika 40 – 7. oktober**

Vinnaratøl: **01 - 08 - 10 - 12 - 18 - 21 - 33**
Eykatøl: **35 - 22**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **5.113.496,- kr.** |
| 6 vinnarat.+1 eykat.: | **54.930,- kr.** |
| 6 vinnaratøl: | **3.956,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **147,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **34,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 40 – 7. oktober**

Jokaratal:
**3 - 0 - 3 - 3 - 7 - 4 - 7**

| | |
|---|---|
| 7 røtt: | **Eingin vinnari** |
| 6 aftastu røtt: | **Eingin vinnari** |
| 5 aftastu røtt: | **19.347,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **2.732- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **265,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **53,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

www.sosialurin.fo

**TIPS 12 úrslit**
**Vika 40**
**8.–9. oktober**

| | |
|---|---|
| 1. B 93–FC Aarhus | 1 |
| 2. Farum–Hvidovre | 1 |
| 3. Frem–Brønshøj | 1 |
| 4. Fremad Am.–Rand. Freja | 2 |
| 5. Horsens–Esbjerg | X |
| 6. Køge–Birkerød | 1 |
| 7. Vejle–B 1913 | X |
| 8. Ølstykke–Skive | 2 |
| 9. B 1909–Nørresundby | 1 |
| 10. Fredericia–Holbæk | 1 |
| 11. Kolding IF–Korup | 2 |
| 12. Næstved–Frederikshavn | 1 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **48.954,- kr.** |
| 11 røtt: | **502,- kr.** |
| 10 røtt: | **39,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**LOTTO**

**Vika 41 - 11. oktober**

Vinnaratøl: **13 - 31 - 37 - 42 - 47 - 48**
Eykatøl: **19 - 45**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **3.313.217,- kr.** |
| 5 vinnarat.+1 eykat.: | **122.060,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **3.419,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **134,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **33,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**TIPS 13 úrslit**
**Vika 40**
**7.–9. oktober**

| | |
|---|---|
| 1. Cypern–Holland | 2 |
| 2. England–Tyskland | 2 |
| 3. Grækenland–Finland | 1 |
| 4. Italien–Rumænien | 1 |
| 5. Jugoslavien–Rusland | 2 |
| 6. Letland–Belgien | 2 |
| 7. Nordirland–Danmark | X |
| 8. Polen–Hviderusland | 1 |
| 9. Portugal–Irland | X |
| 10. Spanien–Israel | 1 |
| 11. Sverige–Tyrkiet | X |
| 12. Tjekkiet–Island | 1 |
| 13. Wales–Norge | X |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **6.289,- kr.** |
| 12 røtt: | **145,- kr.** |
| 11 røtt: | **17,- kr.** |
| 10 røtt: | **0,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**DUSINO**

**Vika 40 – 8. oktober**

Vinnaratøl: **01 - 05 - 07 - 08 - 11 - 16 - 17 - 20 - 21 - 22 - 23 - 24**

| | |
|---|---|
| 12 í sama punti: | **Eingin vinnari** |
| 11 í sama punti: | **2.682,- kr.** |
| 10 í sama punti: | **119,- kr.** |
| 9 í sama punti: | **26,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

HAVNAR BIO

# Handan fasaduna



Dr. Norman Spencer er viðgitin vísundamaður, sum livur í einum kærleiksfullum hjúnarlag við vøkru og evnaríku konu síni, Claire. Tey eru júst flutt inn í eitt hús, sum pápi hansara hevur átt, og tá Claire fer at hoyra røddir og síggja eitt spøkilsiskent kvinnulíki, vísir Norman hesum frá sær sum reinur fantasiur. Men spøkilsið er sera átreingjandi, og Claire ger av fyri seg sjálva at finna út av, hvat tað vil – og harvið tað býr aftanfyri.

Meira skal ikki avdúkast her, tí What Lies Beneath er ein tour-de-force av einum thrillara – kryddaður við yvirnátúrligum og nervapirrandi frásøgnum…

# Flýggjanin úr høsnagarðinum

Eitt lív handan píkatráð. Ævigar paradur, har tann sadistiski kommandanturin allla tíðina kann peika út ein í røðini at doyggja, um hon ikki hevur gjørt sína skyldu. Jamen, er tað so løgið, at hesi høsn bert hava flýggjan í huga?

Heilin handan flýggjanarroyndirnar er Ginger. Hon er ein høna við einum dreymi, einum dreymi um grønar markir uttan stig. Tíverri er tað ikki nóg, ið bendir á, at dreymur hennara gongur út. Høsnabóndin, Hr. Tweedy, hevur vakið eyga við hønunum, og hann er sannførdur um, at tær einans hava flýggjan í huga. Men tað er sjálvandi nakað fjas, tí, sum britan av eini konu, hann hevur, sigur: Hatta eru bara høsn!



Men so finnur Ginger at enda loysnina. Tann amerikanski hanin, sum eitur Rocky, flýgur eina náttina inn um stikið. Um tey bara kunnu sannføra hann um at læra høsnini at flúgva, so bíðar frælsið uttanfyri. tíverri hevur Rocky brotið veingin undir lending, og flúgvitímar hansara føra til, at onkur heldur vildi havt, at hann bara var ein fittur hani í kurvuni. Burtursæð frá gamla Fowler, sum ikki hevur stóran fidus til ein slíkan uppstáplaðan hanakýlling…!




**Frumsýning**
Fríggjadagin 13.10. kl. $20^{45}$ Fríggjadagin 13.10. kl. $23^{30}$
Leygardagin 14.10. kl. $20^{45}$ Leygardagin 14.10. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 15.10. kl. $20^{00}$ Sunnudagin 15.10. kl. $22^{45}$

**Sí eisini SvF tekstvarp s. 611–613**

**HAVNAR BIO**
**✶ Tlf. 311956 ✶**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 13.10. kl. $16^{30}$ Fríggjadagin 13.10. kl. $18^{45}$
Leygardagin 14.10. kl. $16^{30}$ Leygardagin 14.10. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 15.10. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 15.10. kl. $18^{00}$




Fríggjadagin 13.10. kl. $18^{15}$ Fríggjadagin 13.10. kl. $20^{30}$
Leygardagin 14.10. kl. $18^{15}$ Leygardagin 14.10. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 15.10. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 13.10. kl. $23^{00}$ Leygardagin 14.10. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 15.10. kl. $22^{15}$




Fríggjadagin 13.10. kl. $16^{15}$ Leygardagin 14.10. kl. $16^{15}$
Sunnudagin 15.10. kl. $17^{15}$